Arbeiðsgevarar:

# Góðtaka fráboðanarskyldu

**– Arbeiðsgevarar hava einki ímóti at hava fráboðanarskyldu. Hon skuldi bara verið feld í sáttmálan ístaðin fyri í løgtingslóg, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum**



*Jan Mortensen tekur í grundini undir við, at arbeiðsgevarar hava fráboðanarskyldu. Hann vildi tó heldur havt hetta í einum sáttmála og ikki í eini løgtingslóg*

FRÁBOÐANARSKYLDA
*Stefan í Skorini*

Javnaðarflokkurin hevur lagt uppskot fyri tingið, um at áleggja arbeiðsgevarunum fráboðanarskyldu í sambandi við starvssetan av tímaløntum arbeiðsfólki. Føroya Arbeiðarafelag tekur undir við hesum uppskotinum, tí tað tryggjar arbeiðsfólki, ið ikki eru í føstum starvi, nøkur rættindi.

Arbeiðsgevararnir taka undir, at teir fáa fráboðanarskyldu. Teir vildu tó heldur, at hon var í sáttálanum millum partarnar heldur enn í eini løgtingslóg. Teir eru tó sinnaðir at átaka sær hesa skyldu.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum hjá arbeiðsgevarum, sigur, at arbeiðsgevarar bert hava smávegis viðmerkingar til uppskotið, og at teir einki hava ímóti tí. Hann væntar, at tað kanska verður reguleruð eftir viðger í vinnunevndini.

Hann sigur, at Vinnuhúsið hevur mælt arbeiðsgevarum til at kunna arbeiðsfólk um setanarviðurskifti, og teir hava eitt oyðublað til tað sama endamálið.

– Tað er tí keðiligt at hoyra Føroya Arbeiðarafelag siga, at vit ikki vildu hava hetta felt í sáttmálan. Tað skutu vit upp undir sáttmálasamráðingunum, men tá var tað arbeiðarafelagið, ið ikki vildi hava hetta við í samráðingarnar, sigur Jan Mortensen.

# Astrid heiðrað í USA




*Tað er henda røðin av frímerkjum, sum varð kosin vikunnar frímerki í heimsins størsta frímerkjablaði, sum kemur út í USA*

FRÍMERKI
*Stefan í Skorini*

Listakvinnan Astrid Andreasen hevur fingið stóran heiður í einum stórum amerikanskum frímerkjablaði.

Hennara frímerki eru kosin vikunnar frímerki (stamp of the week) í heimsins størsta frímerkjablaði, Linn´s stamp news, sum kemur út einaferð um vikuna í USA.

Frímerkini vórðu givin út 12. februar í ár. Myndirnar á frímerkjunum eru vatnlitamálningar av lindjórum, ið eru smádjór í havinum.

Fýra frímerki vórðu givin út í hesi røðini. Djórini á myndunum eru bertákna, agngágga, lítil høgguslokkur og øða. Astrid Andreasen hevur arbeitt við slíkum djórum í sínum dagliga yrki, og tað er haðani, at hon hevur fingið íblástur til onkra av hesum myndunum.

Svanbjørg Manai á frímerkjadeildini, sigur, at hetta er ein stórur heiður, tí hetta er eitt viðurkent blað í frímerkjaheiminum. Einki annað føroyskt frímerki hevur vunnið henda heiður áður.

Hvørki listakvinnan ella frímerkjadeildin vistu um hetta, fyrr enn samstarvsfelagin hjá frímerkjadeildini í USA sendi teimum teldubræv um tað. Tey hava enn ikki fingið hendur á blaðnum enn.

## Kommunusamskipanin fingið nýggja heimasíðu

INTERNET
*Stefan í Skorini*

Mánadagin 11. mars fær Kommunusamskipan Føroya, KFS, sína heimasíðu á internetinum. Hon fer at lýsa virksemið hjá hesum mennandi kommunufelagsskapi.

Á heimasíðuni verður kunnað um felagið, hvar tað heldur til, hvør situr í stýrinum og starvsbólkinum, um viðtøkur felagsins, lógarsavn og um aktuel mál.

Heimasíðan er ein roynd at upplýsa um felagið og koma tú til limakommunurnar og borgararnar í hesum kommunum, og hon verður ætlandi útbygd javnan.

Eisini verður upplýst um Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, KA. Heimasíðan hevur adressuna: www.kfs.fo og møguleiki verður at vitja hana frá mánadegnum.

# Sáttmálin við Tipstænastuna komin undir land

SÁTTMÁLI
*Stefan í Skorini*

Sáttmálin millum P/F Ítróttarvedding og donsku Tipstænastuna er komin undir land. Partarnir komu endaliga ásamt um innihaldið í sáttmálanum fríggjadagin fyrrapart.

Í eina viku hevur eingin sáttmáli verið á hesum økinum, og partarnir hava havt drúgvar samráðingar um nýggjan sáttmála.

Sáttmálin fevnir um eitt fimm ára tíðarskeið, men báðir partar hava møguleika at siga sáttmálan upp, um viðurskiftini broytast munandi.

Tipstænastan vildi av fyrstan tíð hava felt í sáttmálan, at møguleiki skuldi vera fyri at minka um afturberingina til Føroyar. Hetta kundi føroyska felagið ikki góðtaka undir nøkrum umstøðum.

Tí hava føroyingar tryggjað sær, at um afturberingin minkar, so hevur Ítróttarvedding møguleika at siga sáttmálan upp við eitt ára uppsagnartíð. Tipstænastan hevur hinvegin eisini møguleika at siga sáttmálan upp, um ætlaða landsspælið verður sett á stovn, og um tað gerst ein ov harður kappingarneyti hjá dønum.

Tipstænastan hevði fyrst boðað frá, at hon ikki vildi gera ein sáttmála, sum var longri enn eitt ár, tí landsstýrið hevði ætlanir um at gera eitt stórt landsspæl.

Ítróttarvedding vildi hinvegin hava ein fýra ella fimm ára sáttmála og vísti á, at landsspælið einki samband hevði við spølini hjá Tipstænastuni, sum síðani kúvendi og góðtók tey fimm árini.

Heðin Mortensegn, stjóri í Ítróttarvedding, sigur, at næsta stigið verður at tryggja, at afturberingin til Føroyar ikki minkar. Hetta arbeiði má gerast í Fólkatinginum.

# Fyri rættin í næstu viku

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Væntandi koma tveir 25 ára gamlir menn fyri rættin í næstu viku. Teir eru báðir ákærdir fyri smugling og sølu av amfetamini.

Varðhaldsfongslingin hjá teimum báðum var úti fríggjadagin. Tann eini góðtók uttan rættarfund, at varðhaldsfongslingin varð longd við einari viku. Hin góðtók ikki longda varðhaldsfongsling, og hann var fyri í rættinum fríggjadagin í middegi. Ákærin krevur longda fongsling. Blaðið varð farið til prentingar, tá dómurin fall.

Annar varð tikin 11. januar, tá hann varð tikin við 165 grammum av amfetamini á sær. Hin varð í fyrsta lagi tikin 16. januar, síðani leyslatin, og tikin aftur 25. januar.

Ákæruvaldið væntar, at málini móti teimum báðum koma endaliga fyri í rættinum í næstu viku, og at dómur fellur tá.

Málini verða væntandi viðgjørd saman, tí hesi báðir menninir hava eftir øllum at døma samstarvað.



Búskapur og vinna:

## Meiri olja

Danska oljufelagið DONG hevur gjørt av at fara undir framleiðslu í tveimum brunnum afturat næsta ár. Talan er um oljuleiðirnar Nini og Cecilie í Norðsjónum, sum vórðu funnar í 2000, og sum verða hildnar at hava umleið 65 mió. tunnur av oljiu í sær.

DONG ætlar at byggja tveir ómannaðar pallar, og at oljan skal leiðast ígjøgnum rørleiðingar til Siri-leiðina. Har verður oljan so viðgjørd og skipað umborð í tangaskip. DONG væntar, at tað fer at kosta umleið 2,5 mia. krónur at fara undir nýggju framleiðsluna.

## Lægri mark

Norska stjórnin ætlar at broyta reglurnar um partabrævahandil á marknaðinum í Oslo. Sum er nýtist einum keypara ikki at almannakunngera, hvør hann er, so leingi hann eigur minni enn 10 prosent av partabrøvunum í einum felagi. Hetta heldur stjórnin vera óheppið og mælir til at seta markið til 5 prosent.

Í fjølmiðlunum hevur málið fingið heitið »Lex Røkke«. Víst verður á, at ríkmaðurin Kjell Inge Røkke fleiri ferðir hevur keypt seg inn í feløg, uttan at nakar hevur vitað, hvør keyparin var. Men stjórnin sigur, at uppskotið er sett fram, so reglurnar í Noregi verða tær somu sum aðrastaðni í Evropa. Virðisbrævamarknaðurin í Oslo tekur undir við ætlanini hjá stjórnini.

## Kreppan av

Felagið, sum eigur Kastrup-floghavnina í Keypmannahavn, hevði 490 mió. krónur í avlopi í fjør. Tað er 100 mió. krónur minni enn árið fyri, men leiðslan er kortini væl nøgd eftir ta álvarssomu kreppuna, sum rakti altjóða flogferðsluna síðsta heyst.

18,1 mió. fólk ferðaðust um Kastrup í fjør, og tað var 0,1 prosentmeiri enn í 2000. Næstan 60 prosent av ferðafólkunum ferðaðust við flogførum hjá skandinaviska flogflagnum SAS.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Blóðug nátt í Miðeystri

*Palestinar vápnaðir við maskinbyrsum royna at steðga ísraelskum stríðsvognum í býnum Tulkarem á Vestara Áarbakka*



**22 palestinar og fýra ísraelsmenn doyðu í hevndarálopum gjáranáttina**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ísraelskir hermenn við stríðsvognum skutu 21 palestinar í fleiri álopum á Vestara Áarbakka og í Gaza-geiranum. Álopini vóru hevnd, eftir at ein palestini hevði skotið fýra jødiskar niðursetumenn í einari bygd í Gaza-geiranum. Palestinski álopsmaðurin varð seinni skotin. Í Betlehem oyðiløgdu ísraelsk jagaraflogfør høvuðsstøðina hjá palestinsku trygdartænastuni, og í Gaza skutu ísraelskir hermenn ovastan fyri trygdartænastuni har.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, fanst hósdagin hvassliga at ísraelsku stjórnini og atgerðunum hjá ísraelska herinum. Hann segði, at hvørki Ariel Sharon ella Yassir Arafat gera nóg mikið fyri at fáa enda á tí blóðuga ófriðinum.

Í gjár boðaði George W. Bush, forseti frá, at hevur gjørt av at lata semingsmann sín, Anthony Zinni, fara aftur til Miðeysturs at gera enn eina roynd at fáa partarnar til samráðingarborðið.

# Fann ókendar oyggjar í Grønlandi

**Fylgisveinamyndir av Grønlandi hava avdúkað fýra oyggjar, sum eingin hevur vitað um**

GRØNLAND
*Árni Joensen*

Tað var Johan Mohr, lektari á Tekniska Universitetinum í Danmark, sum fann tær fýra oyggjarnar á fylgisveinamyndum einar 40 fjórðingar úr Nígjuhálvfemsfjørðinum í landnyrðingspartinum av Grønlandi.

Hóast oyggjarnar eru smáar og partvíst liggja undir í sjógvi, kunnu tær uttan iva fáa stóran týdning. Danska blaðið Jyllandsposten heldur, at oyggjarnar kunnu fáa týdning fyri rættindini til møguligt olju- og gassríkidømi undir havbotninum millum Grønland og Svalbard.

Tær fýra oyggjarnar eru í einum øki, har fólk sjáldan eru, og tað er eisini sjáldan, at flogfør flúgva har. Tað vóru nútímans radarmyndir hjá fylgisveinum, sum funnu oyggjarnar.

# Sellafield fer at steðga útlátinum

**Sum eina roynd fer bretska kjarnorkuendurvinningarverkið Sellafield at steðga útlátinum av evninum technetium eina tíð í summar. Gongst sum ætlað, steðgar útlátið næsta ár**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Tað er norska blaðið Bergens Tidende, sum ber tíðindini um, at leiðslan á Sellafield-verkinum hevur gjørt av at steðga til vandamikla útlátinum, og Per Strand, deildarleiðari á norska geislaverndarstovninum, váttar tíðindini fyri blaðnum.

Per Strand sigur, at tað er leiðslan á verkinum, sum hevur tikið avgerðina, og nú er tað bara stjórnin í London, sum kann steðga ætlanini. Sjálvur hevur Per Strand júst verið í Bretlandi saman við einari norskari nevnd, sum m. a. hevur tosað við leiðsluna á Sellafieldverkinum og bretsku umhvørvismyndugleikarnar. Norsku umboðini fingu at vita, at felagið British Nuclear Fuels, sum eigur verkið í Sellafield, fer at senda stjórnini í London eina umsókn um at steðga útlátinum. Ætlanin hjá leiðsluni er fyrst at gera eina roynd í summar, og eydnast hon, er ætlanin at steðga útlátinum næsta ár.

Norska stjórnin hevur leingi roynt at leggja trýst á bretar fyri at fáa teir at steðga technetium-útlátinum frá Sellafieldverkinum. Norðmenn vilja vera við, at útlátið frá verkinum kemur við havstreyminum norður við norsku strondini, og at tað sum frá líður kann dálka fiskastovnarnar.

Norski umhvørvismálaráðharrin, Børge Brende, segði herfyri, at Sellafieldverkið órógvaði viðurskiftini millum Noreg og Bretland. Nú fegnast ráðharrin um, at málið nærkast eini loysn.

Úr Norðurlondum:

## Afturgongd

Nú danska stjórnin hevur sitið við valdið í hundrað dagar, vísir ein veljarakanning, at tað er farið at ganga aftur á hondina hjá flokkinum hjá Anders Fogh Rasmussen, forsætisáðharra.

Tann nýggja kanningin gevur Vinstra 30,6 prosent av atkvøðunum. Tað ber í sær, at hevði val verið nú, hevði flokkurin mist tvey av sínum umboðum í Fólkatinginum. Verður úrslitið borið saman við eina tilsvarandi kanning í desember, hevði flokkurin fingið sjey tinglimir færri nú enn tá.

Hin stjórnarflokkurin, Teir Konservativu, fáa 16 tingmenn, eins og teir hava, og hjá Danska Fólkaflokkinum er heldur eingin broyting. Kanningin gevur flokkinum 22 tinglimir, og tað er tað sama, sum hann hevur.

## Vánalig ummæli

Norsku fjølmiðlarnir halda yvirhøvur lítið um nýggja filmin »Jeg er Dina«, sum varð frumsýndur í norskum biohallum í gjárkvøldið. Tað er danin Ole Bornedal, sum hevur leikstjórnað filminum, og millum leikararnar er kendi franski filmsleikarin Gérard Départieu. Norsku ummælararnir halda, at filmurin er alt ov dramatiskur og alt ov ráður, sum teir taka til. Tað hevur kostað einar 130 mió. krónur at gera filmin.

## Óskil

Danska løgreglan gjørdi eitt rættiligt hál á markinum millum Danmark og Týskland hósdagin. Tað vísti seg m. a., at sjey fólk vóru í Danmark uttan at hava loyvi at vera í landinum. 24 lastbilførarar endaðu í svørtubók, tí teir høvdu sitið fleiri tímar við róðrið, enn loyvt er, og 32 aðrir bilførarar vórðu eisini uppskrivaðir. Ein maður varð tikin fyri at royna at smugla rúsdrekka, og hann fær eina rokning upp á meiri enn 200.000 krónur.